

# Stjóri til Dátueftirlitið

**Hevur tú hug at mynda ein stovn í broyting og skapa fakliga virðing? Hevur tú stóran áhuga fyri dátuvernd? So ert tú kanska tann vit søkja eftir, nú Dátueftirlitið skal hava nýggjan stjóra.**

Dátueftirlitið er í eini broytingartíð, tí nýggj dátuverndarlóg kom í gildi 1. januar 2021.

## Høvuðsuppgávur

Stjórin hevur dagligu leiðsluna og ábyrgdina av Dátueftirlitinum og skal saman við starvsfólkunum mynda Dátueftirlitið úteftir.

Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna m.a. um málsviðgerð, eftirlit, vegleiðing og ráðgeving, samskifti við fjølmiðlarnar og luttøku í millumtjóða samstarvi á økinum. Nýggja Dátuverndarlógin hevur við sær, at tað framyvir verður størri fokus á kunning og vegleiðing.

## Faklig førleikakrøv

Sett verður sum krav, at umsøkjarar hava løgfrøðiligt embætisprógv. Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarar hava viðkomandi royndir á dátuverndarøkinum og hollan kunnleika til og skil fyri KT. Umsøkjarar eiga eisini at hava góðan kunnleika til fyrisitingarrætt.

## Persónlig førleikakrøv

Umframt løgfrøðiligt embætisprógv og viðkomandi royndir, verður væntað, at tú sum søkir:

- hevur innlit og góð evni at leiða
- hevur stóran áhuga fyri dátuverndarøkinum
- hevur góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst
- kann skapa fakliga virðing kring stovnin
- kann vera fakligur sparringspartnari hjá starvsfólkunum
- dugir væl at málbera teg á føroyskum og enskum
- dugir at samskifta úteftir og er opin og nýhugsandi
- kann luttaka í almenna orðaskiftinum um dátuvernd
- hevur evni at finna praktiskar loysnir, sum sampakka bæði við løgfrøðina og samfelagið vit liva í.

## Løn og setanartreytir

Starvið verður lønt ájavnt við 37. lønarflokk hjá Tænstumonnum Landsins, tó uttan at talan er um tænastumannastarv. Eftirlønargjaldið er 15%. Setanartreytir annars verða ásettar í stjórasáttmála.

## Umsóknir

Umsókn saman við CV, prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til lms@lms.fo

Til ber eisini at senda umsókn sum bræv til:
Løgmansskrivstovan,
Tinganes,
Postrúm 64,
FO-110 Tórshavn.

Freistin at søkja er 8. februar 2021.
Starvið verður sett skjótast til ber.

Setanartilgongdin er sambært setanarpolitikki landsins. Setanarpolitikkur landsins er lýstur á www.fmr.fo/fo/lonardeildin/starvsfolkapolitikkur/

Meira fæst at vita um starvið við at ringja til Nellu Festirstein, deildarstjóra, á tlf. 55 80 76. Eisini ber til at senda fyrispurning til nellaf@tinganes.fo

---

Uppgávan hjá Dátueftirlitinum er at umsita Dátuverndarlógina. Dátueftirlitið er óheftur fyrisitingarmyndugleiki, sum vísir til Løgmansskrivstovuna. Dátueftirlitið er skipað við ráði og avgreiðsluskrivstovu. Avgreiðsluskrivstovan fyrireikar mál at leggja fyri Dátuváðið. Avgreiðsluskrivstovan røkir dagliga virksemið hjá Dátueftirlitinum. Dáturáðið, sum løgmaður setir, er skipað við formanni og fýra nevndarlimum. Dátueftirlitið hevur eftirlit við, at øll viðgerð, sum Dátuverndarlógin fevnir um, fer fram í samsvari við lógina. Dátueftirlitið skal harumframt leggja stóran dent á tann partin av arbeiðinum, sum er fyribyrgjandi, vegleiðandi og kunnandi. Í hesum sambandi ger Dátueftirlitið tilfar og skipar fyri ymiskum átøkum. Á Dátueftirlitinum starvast fimm fólk, íroknað stjóran.

---

The Government of the Faroe Islands
**LØGMANSSKRIVSTOVAN**
Prime Ministers Office